B6-9

MENNINGARSTOVAN
Postboks 1287
Hoyvíksvegur 51
FR - 110 Tórshavn

# Telefonverk Føroya Løgtings

## Frágreiðing um umskipan av TFL til partafelag

## 1. INNGANGUR

Telefonverk Føroya Løgtings (TFL) er ein stovnur undir Føroya Landsstýri. Landsstýrismaðurin í fjarskiftismálum hevur endaligu fyrisitingarligu ábyrgdina av TFL. Telefonverksstjórin hevur ta dagligu ábyrgdina.

TFL er stovnað sambært lóg og verður rikið sambært kunngerðum frá Føroya Landsstýri, sum hevur einkarætt til fjarskiftistænastur í Føroyum.

Fjarskifti og kunningartøkni eru øki, sum eru í skjótari menning, bæði í Føroyum og í øðrum londum. Aftan fyri menningina liggur ein hugburður um, at fjarskifti og kunningartøkni sum heild eru av stórum týdningi fyri samfelagsligu og búskaparligu menningina yvirhøvur.

Eisini í Føroyum er gongd komin í á fjarskiftisøkinum. Ein nýggj føroysk fjarskiftislóg fær gildi 1. juli 1997. Nýggja fjarskiftislógin setur karmarnar fyri liberaliseringum og harvið eini vaksandi kapping mótvegis TFL.

Fjarskiftið kennir ikki til landamørk, hvørki fíggjarliga ella tøkniliga. Internationaliseringin merkir, at bæði marknaðurin í Føroyum og virksemið á TFL virka í einum altjóða høpi, og at sammetingar mugu gerast í einum altjóða høpi.

Rákið í londunum rundan um okkum vísir, at tað verða knýtt tættari handilslig bond millum lond við avtalum, t.d. EBS og WTO. Umframt at Føroyar skulu fylgja reglunum hjá WTO, hevur orðaskifti verið um at gera eina EBS-líknandi avtalu við ES. Slíkar avtalur seta m.a. krøv um liberaliseringar á telesamskiftisøkinum.

Uttan mun til formligar liberaliseringar hevur tann tøknifrøðiliga menningin við sær, at kappingin mótvegis TFL veksur. Sum dømi kunnu nevnast call-back tænastur úr øðrum londum, fylgisveinaskipanir og bilig radioútgerð. Hesi viðurskifti máða støðið undan verandi einkarætti og undan ávísum forrætningsumráðum, eitt nú uttanlandssamskiftinum.

Omanfyri nevndu viðurskifti hava við sær, at tað er alneyðugt at fylgja við menningini á fjarskiftisøkinum. TFL má tí støðugt tillaga seg broytingum í marknaðarviðurskiftunum.

Broyttu umstøðurnar hava í londunum kring okkum havt við sær víttfevnandi bygnaðarbroytingar í fjarskiftisfyritøkunum. Áðrenn liberaliseringar av álvara taka seg upp og kappingin mótvegis almenna einkarættarhavaranum harðnar, eru hesir almennu stovnar oftast umskipaðir til partafeløg. Hetta er m.a. hent í Íslandi og Grønlandi.

Eisini í Føroyum má støða takast til, hvussu bygnaðurin á fjarskiftisøkinum skal skipast. Í hesum sambandi varð fundur hildin millum leiðslu og álitisfólk á TFL, umboð fyri fakfeløgini og ein fulltrúa úr Føroya Landsstýri.

Á fundinum varð avgjørt, at ein arbeiðsbólkur skuldi gera eina frágreiðing til Føroya Landsstýri um, hvussu TFL eigur at verða skipað í framtíðini.

Í arbeiðsbólkinum vóru:

Andras Róin, telefonverksstjóri, vegna leiðsluna á TFL
Una Joensen, vegna leiðsluna á TFL
Janus Djurhuus, felagsálitsmaður, vegna starvsfólk á TFL
Jógvan Thomsen, varaálitsmaður, vegna starvsfólk á TFL
Jákup Danielsen, formaður í Starvsmannafelagnum
Súni Schwartz Jacobsen, statsaut. revisor, KPMG.

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt ymiskar bygnaðarmøguleikar, t.d. núverandi bygnað, "nýmótans" almennan stovn, almennan stovn við egnari nevnd, vinnurekandi grunn og partafelag. Í viðgerðini hevur dentur verið lagdur á leiðsluviðurskifti og avgerðarførleika. Arbeiðsbólkurin er samdur um, at umskipan av TFL til eitt partafelag gevur bestu fortreytir á framtíðar fjarskiftismarknaðinum. Tí eru einans viðurskifti viðvíkjandi einum partafelag lýst í hesi frágreiðing, meðan tað í ískoyti 1 stutt er greitt frá øðrum bygnaðarmøguleikum. Bólkurin hevur ikki tikið støðu til, hvussu ognarviðurskiftini til TFL skulu verða í framtíðini. Útgangsstøðið hevur sostatt verið, at TFL í fyrstu syftu verður umskipað til eitt 100% alment partafelag.

## 2. NIÐURSTØÐA

Nýggja fjarskiftislógin, ið fær gildi frá 1. juli 1997, gevur møguleikar fyri liberaliseringum og harvið øktari kapping mótvegis TFL.

Rákið á fjarskiftisøkinum er ógvusligt, og bæði TFL og føroyska samfelagið kunnu skjótt gerast eftirbátar, um ikki rætt verður borið at. Fyri at standa seg í framtíðar fjarskiftisumhvørvinum er tað tí alneyðugt, at TFL fær teir neyðugu karmarnar at virka undir, soleiðis at m.a. avgerðir kunnu takast við tí skjótleika og frælsi, sum er neyðugt.

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt fortreytirnar fyri einum kappingarførum TFL. Herundir eru viðgjørdir ymiskir bygnaðarmøguleikar fyri at lýsa leiðsluviðurskifti og avgerðarfrælsi.

Til tess at kunna veita viðskiftafólkunum tær tænastur, sum hoyra til í einum nýmótans samfelagi, at kunna tryggja eitt nøktandi fjarskiftiskervi um allar Føroyar og at kunna leggja lunnar undir eitt neyvari samstarv við aðrar fyritøkur á fjarskiftisøkinum, er alneyðugt at fylgja rákinum í øðrum londum og at virka fyri, at eisini TFL verður umskipað til partafelag skjótast gjørligt.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at starvsfólkaviðurskiftini undir ongum umstøðum eiga at versna, eftir at TFL er umskipað til eitt partafelag.

Sum lýst í hesi frágreiðing, er ein umskipan til partafelag ikki ein trupul uppgáva, hóast arbeiðs- og tíðarkrevjandi. Arbeiðsbólkurin metir tað vera ein fortreyt fyri haldgóðari menning av fjarskiftisøkinum í Føroyum, at vit eru eitt virkandi partafelag pr. 1. januar 1998, og fyri at hetta skal eydnast krevst, at politiskt loyvi verður givið til eina umskipan tíðliga á heysti 1997.

**Arbeiðsbólkurin heitir tí við hesum á Føroya Landsstýri um at skipa so fyri, at TFL skjótast til ber verður umskipað til eitt alment partafelag.**

Arbeiðsbólkurin vónar, at Føroya Landsstýri og Føroya Løgting skilja týdningin av, at skjótt verður borið at. Arbeiðsbólkurin vónar, at okkara ynski verða gingin á møti av Føroya Landsstýri, og at tey kunnu viðgerast av Føroya Løgtingi skjótast gjørligt eftir ólavssøku 1997.

Tórshavn, tann 26. juni 1997

| | | |
|---|---|---|
| Andras Róin | Una Joensen | Janus Djurhuus |
| Jógvan Thomsen | Jákup Danielsen | Súni Schwartz Jacobsen |

## 3. ENDAMÁL VIÐ UMSKIPAN AV TFL TIL PARTAFELAG

Høvuðsendamálini við at umskipa TFL til eitt partafelag eru:

1. At gera skilnað millum
   - politisku ábyrgdina og dagligu leiðsluábyrgdina
   - fyrisitingarligu- og dagligu rakstrarábyrgdina
   - eftirlitið við og raksturin av fjarskiftinum

   Sambært nýggju fjarskiftislógini kann landsstýrismaðurin veita konsessión fyri eitt umráði til eina ella fleiri fyritøkur. Skilnaður eigur at verða gjørdur millum tann myndugleika, ið veitir konsessiónir, og eigaraviðurskiftini til tær konsessioneraðu fyritøkurnar. Við at umskipa TFL til eitt partafelag fæst tann neyðugi skilnaðurin.

   Harafturat eru ábyrgdarviðurskiftini í einum partafelag greið, við tað at nevnd og stjórn hava endaligu rakstrarligu ábyrgdina.

   Politisk ávirkan, fyrisitingarlig ávirkan og eftirlit verða tryggjað gjøgnum ognarviðurskiftini, konsessiónstreytirnar og fjarskiftiseftirlitið.

2. Økt kapping krevur økt avgerðarfrælsi og møguleika at taka avgerðir eftir handilsligum fortreytum. Avmarkað avgerðarfrælsi í mun til kappingarneytarnar ger tað torført at standa seg í tí alsamt vaksandi altjóða kappingini.

   Ein almennur stovnur hevur, sum er, ikki somu møguleikar at tillaga seg á einum marknaði í kapping - til tess eru karmarnir ov stirvnir.

   Tað er ein sannroynd, at týdningarmiklar avgerðir fyri ein almennan stovn kunnu fáa drúgva viðgerð í landsfyrisitingini, og møguliga eisini í løgtinginum, áðrenn avgerð verður tikin.

   Í einum partafelag er grundarlag fyri eini skjótari viðgerð, tí tað er leiðslan, ið tekur slíkar avgerðir.

3. Tær telefyritøkur, ið TFL samstarvar við, eru í flestu førum fyrrverandi almennir stovnar, ið eru umskipaðir til partafeløg, m.a. fyri at standa seg í kappingini. Telefyritøkur skipaðar sum partafeløg eru sostatt vælkendar í øðrum londum.

   Tað er av stórum týdningi fyri samstarvspartarnar, at leiðslan á TFL hevur avgerðarførleika til at gera neyðugar avtalur.

# 4. INNTØKUGRUNDARLAG, ÚTLIT OG ÆTLANIR

## 4.1 Inntøkugrundarlag

Tá spurningurin um umskipan av einum almennum stovni til eitt sjálvstøðugt partafelag skal viðgerast, er natúrligt fyrst at gera nakrar metingar um virksemi stovnsins og núverandi inntøkugrundarlagið, fyri at lýsa grundarlagið fyri eini sjálvstøðugari tilveru hjá fyritøkuni.

Núverandi inntøkugrundarlag kann lýsast við støði í nettosøluni, og kann sundurgreinast soleiðis:

| tkr. | R1995 | R1996 | Æ1997 | Æ1998 |
|---|---|---|---|---|
| Fastnettelefoni | 55.000 | 80.000 | 86.000 | 88.000 |
| Fartelefoni | 12.000 | 15.000 | 18.000 | 21.000 |
| Felagagjøld | 23.000 | 23.000 | 25.000 | 25.400 |
| Annað | 41.000 | 29.000 | 36.000 | 40.000 |
| Nettosøla í alt | 131.000 | 147.000 | 165.000 | 174.400 |

Minkingin í øðrum inntøkum og vøksturin í inntøkunum frá fastnettelefoniini frá 1995 til 1996 stava fyri ein stóran part frá avtalum við Tele Danmark um yvirtøku av ymiskum umráðum. Frá 1996 fer vøksturin einahelst at stava frá fartelefoni og øðrum inntøkum m.a. telebúðum og nýggjum tænastum.

Mett verður, at TFL hevur eitt gott inntøkugrundarlag við góðum møguleikum fyri framhaldandi vøkstri og rentablum rakstri, og harvið einum góðum útgangsstøði til at klára seg í einum kappingarumhvørvi.

## 4.2 Ætlanir

Tær ætlanir, sum verða lagdar í eini telefyritøku, mugu avspegla tað umhvørvi og tær spælireglur, sum verða mettar at verða galdandi tey komandi árini. Ætlanirnar skulu umfata prísir, marknaðarútlit, fíggjarviðurskifti (performance), tænastustøði og útboð, bygnaðin innanhýsis og úteftir, samstarvsmøguleikar o.s.fr. Felagsheitið er **kappingarføri.**

**rakstrarviðurskifti:** TFL er væl fyri rakstrarliga í mun til t.d. aðrar føroyskar stovnar. Neyðugt er tó at meta okkum við aðrar núverandi og komandi telefyritøkur. Til sammetingar eru niðanfyri víst lyklatøl fyri aðrar telefyritøkur í Norðurlondum:

| Lyklatøl fyri 1996 | TFL | Tele DK | TELE GR | PÓSTUR OG SÍMI |
|---|---|---|---|---|
| Rakstraravkast (%) | 19,9 | 19,5 | 10,4 | 16,3 |
| Ognaravkast (%) | 12,3 | 9,7 | 5,3 | 10,5 |
| Gjaldførisevni (%) | 83,0 | 190,2 | 148.0 | 199,0 |
| Trygdarevni (%) | 30,0 | 59,2 | 44,5 | 52,6 |
| Nettosøla pr. starvsfólk (t.kr.) | 809 | 1.430 | 1.122 | *) |

*) tølini eru ikki tøk

"Performance" parametrar á fíggjarliga økinum, sum t.d. rakstraravkast, gjaldførisevni, trygdarevni, søla og úrslit pr. starvsfólk v.m., eru parametrar, sum verða høgt prioriteraðir í framtíðar ætlanunum.

**prísir:** Umframt ein minni marknað enn í londunum uttan um okkum hava vit í Føroyum hægri rakstrar- og íløgukostnaðir. Hetta merkir, at prísleganan er hægri enn í øðrum londum.

Men við yvirtøkum, framskundaðum digitaliseringum og bygnaðarbroytingum eru fortreytirnar fyri príslækkingum á fleiri økjum um at vera til staðar.

**marknaðarútlit og tænastuútboð:** Fjarskiftismøguleikarnir eru serliga áhugaverdir í einum útjaðaraøki sum tí føroyska, og er hetta við til at økja áhugan hjá øðrum telefyritøkum at virka her. Væntast kann sostatt, at tænastuútboðið veksur, hóast tað helst verður minni enn í londunum uttan um okkum.

Ein fortreyt fyri einum framhaldandi góðum og nøktandi inntøkugrundarlagi er, at tænasturnar, sum TFL bjóðar út, eru tillagaðar til marknaðin bæði í nøgd, góðsku og í prísi.

Fyri at fylgja við í menningini á fjarskiftisøkinum má TFL alsamt gera íløgur í nýggja tøknifrøði til tess at kunna bjóða út nýggjar og meira framkomnar tænastur. TFL skal til eina og hvørja tíð kunna nøkta tørvin og krøvini hjá viðskiftafólkunum og gera hetta á einum handilsliga forsvarligum grundarlagi. Tí má TFL, við ella uttan liberaliseringar, skjótast til ber tillaga virksemið fyri at klára seg í einum kappingarumhvørvi.

Tá ið talan er um møguligar nýggjar tænastur, fer TFL í hvørjum einstøkum føri at gera metingar av, um talan er um tænastur, ið geva avkast og undir hvørjum treytum. Hetta fer at krevja skjótar og smidligar mannagongdir, neyvar fíggjarligar lýsingar og eina strategiska tilrættislegging á einum støði, sum ikki hóskar saman við núverandi tilknýti til politisku skipanina.

**bygnaðurin:** bygnaðurin innanhýsis má laga seg til broyttu marknaðarkrøvini og broytingarnar í umhvørvinum sum heild. Úteftir merkir hetta, at TFL má virka sum ein handilsfyritøka uttan ov nógvar politiskar bindingar á rakstrar- og íløgusíðuni.

**samstarvsmøguleikar:** orsakað av internationaliseringini verður tað alsamt meira umráðandi, at TFL megnar at samstarva við aðrar fyritøkur í Føroyum og uttanlands.

### 4.3 Fortreytir fyri ætlanunum

Eitt er at leggja langtíðarætlanir og seta málsetningar fyri TFL. Til tess at seta ætlanirnar í verk, leggja til rættis og røkka teimum settu málunum krevst, at fleiri fortreytir eru til staðar. Í hesum viðfangi skulu triggjar høvuðsfortreytir nevnast, nevniliga íløgur, avgerðarfrælsi og human ressources/starvsfólk:

**Íløgur**

Íløgur á fjarskiftisøkinum eru at sammeta við íløgur í telduútgerð. Fyri hvørt ár fæst betri, hentari og effektivari útgerð fyri minni pening, men samstundis er fyri TFL eisini talan um sera íløgukrevjandi virksemi og støðugt vaksandi krøv frá viðskiftafólki um betri og bíligari tænastur.

TFL hevur inntil 1996 arbeitt út frá einari langtíðaríløguætlan, har mett varð, at TFL hevði ráð til og annars helt tað vera skilagott at gera íløgur fyri 20 mill. kr. um árið. Sambært hesi langtíðaríløguætlan vildi verið møguligt at digitaliserað meginpartin av Eysturoynni í ár 1999 og Norðuroyggjar í ár 2001.

Langtíðaríløguætlanin tók ikki í nóg stóran mun hædd fyri eitt nú broytingum í marknaðarstøðuni á fjarskiftisøkinum í Føroyum. Heldur ikki var hædd tikin fyri, at einasti mátin at kunna lúka krøvini um betri og bíligari tænastur og at varðveita ein skilagóðan fíggjarpolitikk er at økja íløgurnar í betri og effektivari útgerð.

Eitt lágt íløguprosent í mun til søluna tey seinastu árini hevur gjørt, at TFL ikki hevur havt sama ágóða av nýggjari og betri tøknifrøði, sum tey hava havt í t.d. Íslandi. Tey seinastu árini hava íløgurnar hjá TFL svarað til umleið 10-14% av søluni. Í Íslandi og Grønlandi og fleiri av teimum størru londunum í Europa hava íløgurnar verið omanfyri 20% av søluni.

Digitalisering er ein fortreyt fyri fleiri og betri tænastum til viðskiftafólkið, eins og hon skapar møguleikar fyri minkandi rakstrarútreiðslum hjá TFL og harvið møguleikar fyri takstlækkingum í framtíðini. Tí hevur TFL søkt um loyvi til at hækka íløgurnar munandi tey næstu árini til tess at m.a. framskunda digitaliseringina, soleiðis at meginparturin av Eysturoynni verður digitaliseraður á heysti 1997 og Norðuroyggjar í 1998.

**Avgerðarfrælsi**

TFL hevur í dag ikki fult avgerðarfrælsi, hvørki viðvíkjandi íløgum, fíggjarviðurskiftum sum heild ella í øðrum samanhangum. Hetta kann náast við at gera TFL um til eitt partafelag.

**Human ressources/starvsfólk.**

Ein onnur avgerandi fortreyt, sum má vera til staðar, er, at TFL til eina og hvørja tíð hevur neyðuga serkunnleikan. Fjarskiftið, teldutøknin og rákið móti sokallaða kunningarsamfelagnum seta alsamt størri krøv til førleikan hjá m.ø. starvsfólkunum á TFL.

Hetta kann fyri ein part uppfyllast við at økja skeiðvirksemið og eftir- og endurútbúgvingina. Viðvíkjandi starvsfólki við røttu førleikum eru marknaðarkreftirnar, útboð og eftirspurningur, tó galdandi.

Tað verður alsamt truplari hjá TFL at varðveita ekspertisuna og at fáa nýggj fólk at taka við starvi á TFL - til tess er lønarlagið alt ov lágt fyri einahelst leiðarastørvini og starvsfólk við serkunnleika.

Sum partafelag fær TFL nýggjar og betri møguleikar, men ikki minst í fyrireikingini til umskipan til partafelag hevur TFL brúk fyri góðum og stimbrandi setanar- og lønarviðurskiftum.

## 5. FÍGGJARVIÐURSKIFTI

Ein smidligari avgerðarførleiki í fíggjarmálum er av stórum týdningi í einum framtíðar kappingarumhvørvi. Í núverandi støðu er neyðugt at søkja landsstýrið um góðkenning til nýggjar lántøkur ella broytingar í verandi lánum. Í einum partafelag er tað leiðslan, ið tekur slíkar avgerðir.

Væntaða skuldin tann 1. januar 1998 verður 87,7 mió kr og kann sundurgreinast soleiðis:

| | Mió.kr. |
|---|---|
| Nordiska Investeringsbanken | 52,4 |
| Skandinaviska Enskilda Banken | 7,2 |
| Íløgugrunnurin | 28,1 |
| | 87,7 |

Lánini í Nordiska Investeringsbanken og Skandinaviska Enskilda Banken eru veitt við landskassaveðhaldi.

Í sambandi við umskipan til partafelag eru fleiri møguleikar viðvíkjandi lánískuldini. Her kunnu nevnast møguleikar fyri, at:

1) partafelagið yvirtekur skuldina við verandi landskassaveðhaldum

2) partafelagið yvirtekur skuldina, og landskassaveðhaldið fellur burtur móti at lánveitararnir í staðin fáa veðhald í ognum TFL.

3) skuldin verður løgd um og møguliga fíggjað av føroyskum peningastovnum við veðhaldi í ognum TFL. Leiðslan á TFL hevur ta fatan, at føroyskir peningastovnar o.l. eru sinnaðir at veita partafelagnum neyðug lán.

Tann fyrsta loysnin er helst tann biligasta, tí viðurskiftini viðvíkjandi lánunum í stóran mun eru óbroytt.

Fyri at lætta um umskipanina og við tað at lánini verða skjótt afturgoldin, verður møguleiki 1) mettur at vera tann besti í verandi støðu.

Eftir at TFL er umskipað til partafelag, verða møgulig nýggj lán tikin uttan landskassaveðhald.

## 6. STARVSFÓLKAVIÐURSKIFTI

Á TFL eru eingi tænastumannasett starvsfólk.

### 6.1 Sáttmálar

Øll starvsfólk eru sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Landsstýri. Sambært sáttmálunum eru starvsfólkini limir í fakfeløgum, sum umboða teirra starvsheiti og starvsøki. Verandi sáttmálar eru galdandi til 1999.

Yrkisfeløgini eru: Starvsmannafelagið, Magistarafelag Føroya, Føroya Verkfrøðingafelag, Búskapar- og Løgfrøðingafelagið, Havnar Arbeiðsmannafelag, Føroya Arbeiðarafelag og Handverkarafelagið.

Í sambandi við umskipan av TFL til partafelag verða øll starvsfólk flutt yvir í partafelagið, sum yvirtekur landsstýrisins rættindir og skyldur í hesum sambandi. Í seinasta lagi 6 mánaðir áðrenn verandi sáttmálar ganga út, fara samráðingar í gongd millum verandi feløg og leiðsluna um nýggjar sáttmálar. Hesi viðurskifti eiga at verða ásett í lógini um umskipan av TFL til partafelag.

Allir partar skulu viðurkenna, at tað eru starvsfólkini á TFL, sum avgera, hvør tey ynskja skal samráðast teirra vegna, og so leingi annað ikki er avtalað, verða tað verandi feløg, sum hava samráðingarrættin.

### 6.2 Lønarskipan

Verandi lønarskipan er bygd upp eftir einum grundlønarprinsippi, og fær størsti parturin av starvsfólkunum mánaðarløn. Limir í arbeiðarafeløgunum fáa tó tímaløn.

Størvini eru flokkað í lønarflokkar, alt eftir starvsheiti og innihaldi í starvinum. Verandi skipan ella praksis kann virka ov stirvin, tá ynski eru um at løna fólki øðrvísi - t.d. í sambandi við størri ella fleiri arbeiðsuppgávur, størri ábyrgd og útbúgving.

Tað er tí eitt breitt ynski um at fáa til vega lønarskipan, sum er greiðari og smidligari og sum motiverar starvsfólkini í størri mun enn nú. Arbeiðið at gera nýggja lønarskipan er eitt tíðarkrevjandi og týdningarmikið arbeiði, og hava fakfeløg sett sær sum mál at virka miðvíst ímóti at finna nýggjar leiðir. Leiðslan á TFL hevur givið til kennar, at verandi lønarskipanir eru ov stirvnar, og torført kann verða at fáa serkøna arbeiðsmegi at taka við starvi á TFL.

Starvsfólkini hava ymiskar pensjónsskipanir, alt eftir hvørjum fakfelag tey eru í. Ynskiligt er at gera avtalu um eins pensjónsskipanir eftir prinsippinum 1/3 lønarpartur og 2/3 arbeiðsgevarapartur.

Hesi komandi árini verður ivaleyst arbeitt fram ímóti at finna ta best hóskandi lønarskipanina, sum gevur starvsfólkunum løn fyri tað arbeiði, tey gera, sum motiverar starvsfólkini at útbúgva seg og eina lønarskipan, sum gevur leiðsluni betri møguleikar at løna fólki við servitan og uppgávum annars.

Slík skipan krevur tó, at reglurnar um lønaráseting eru greiðar, lættar at skilja og, ikki minst, lættar at umsita. Roknast má við, at álitisfólkini ella umboð fyri starvsfólkini í størri mun enn nú koma at hava ein leiklut í lønarásetingini.

### 6.3 Onnur starvsfólkaviðurskifti

Felags fyri leiðslu og starvsfólk er at hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har leiðsla og starvsfólk hava sum endamál at veita viðskiftafólkunum eina góða og effektiva tænastu.

Innlit, ávirkan og opinleiki um virksemi og ætlanir eru týðandi fortreytir fyri, at starvsfólkini trívast og mennast.

Eitt gott amboð í samskiftinum millum leiðslu og starvsfólk er samstarvsnevnd/-ir. Í samstarvsnevndum verða t.d. arbeiðsviðurskifti, starvsfólkaviðurskifti, tillagingar í virkseminum, nýggj tøkni, fíggjarviðurskifti, praktiskar fyriskipanir, reglugerðir og starvsfólkapolitikkur v.m. viðgjørd.

Neyðugt er eisini við einum miðvísum útbúgvingar-, eftirútbúgvingar- og skeiðpolitikki, sum allir starvsbólkar eru partur av. Endamálið við slíkum politikki er, at starvsfólkini fáa ta eftirútbúgving, sum er neyðug til at kunna røkja teirra arbeiði og at menna teirra førleika.

Starvsfólkaviðurskifti verða skipað sambært starvsfólkapolitikki. Starvsfólkapolitikkur er ein lýsing av teimum reglum og viðurskiftum, sum eru galdandi á arbeiðsplássinum. Starvsfólkapolitikkurin verður myndaður við atliti at virksemi TFL. Ein arbeiðsbólkur er settur á TFL at orða ein starvsfólkapolitikk.

Samanumtikið er høvuðsendamálið við starvsfólkapolitikkinum, at arbeiðsplássið skal vera áhugavert og spennandi, har starvsfólk vilja virka, støðast og mennast. Samstarvsnevndin hevur ábyrgd av starvsfólkapolitikkinum.

## 7. PARTAFELAGSVIÐURSKIFTI

Tað er av týdningi, at tey politiskt avgjørdu viðurskiftini - tað veri seg lógargrundarlag, konsessiónsavtalur o.a., eru fastløgd, áðrenn almenna partafelagið verður stovnað.

### 7.1 Stovnan

Stovnan av partafelagnum kann fremjast við kontantum inngjaldi fyri partabrøvini ella við innskoti av nettoogn (apportinnskoti).

Við tað at núverandi virksemi hjá TFL verður umskipað frá almennum stovni til partafelag, kunnu partabrøvini verða goldin við apportinnskoti. Tað er tí ikki neyðugt at inngjalda partapeningin kontant. Verða partabrøv fult ella partvíst goldin við partabrøvum, skulu ein metanarfrágreiðing og ein byrjanarfíggjarstøða fyri partafelagið gerast.

Felagið kann sambært praksis stovnast við afturvirkandi gildi í upp til 6 mánaðir, tá talan er um umskipan av einum verandi virki. Verður felagið stovnað pr. 1. januar 1998, skulu øll tey formligu viðurskiftini í sambandi við stovnanina verða avgreidd í seinasta lagi 30. juni 1998.

Nevndin skal skráseta felagið hjá Skráseting Føroya í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at stovningarskjalið er undirskrivað.

**7.2 Viðtøkur**

Partafelagslógin er galdandi fyri øll partafeløg. Partafelagslógin er á fleiri økjum ein rammulóg. Í tí einstaka felagnum eru viðtøkurnar "lógin" fyri felagið og útfylla rammulógina. Viðtøkurnar skulu taka støðu til ítøkiligar spurningar um t.d. navn, heimstað, endamál felagsins, viðurskifti um partapening, nevnd, stjórn, aðalfund og grannskoðara. Partapeningurin í einum partafelag skal vera minst 500.000 kr.

Mett verður, at viðtøkurnar í fyrstu atløgu bert skulu taka støðu til tey viðurskifti, ið eru neyðug fyri at reka eitt 100% alment partafelag.

Seinni kann so støða takast til viðtøkubroytingar, eitt nú um og á hvønn hátt partapeningur verður útboðin til privatar investorar.

Av tí at TFL væntandi fer at virka í einum hørðum kappingarumhvørvi, og neyðugt er við stórum íløgum, eiga viðtøkurnar at taka støðu til eitt hægstamark fyri vinningsbýti. Hetta skal tryggja, at TFL verður konsoliderað best møguliga.

**7.3 Leiðsluviðurskifti**

Í einum partafelag er aðalfundurin hægsti myndugleiki. Aðalfundurin verður umboðaður av partaeigarunum.

Aðalfundurin velur eina nevnd, sum skal hava ábyrgdina av leiðsluni í felagnum. Nevndin setur eina stjórn at taka sær av dagligu leiðsluni.

Í einum 100% almennum partafelag er tað avvarðandi landsstýrismaður, sum er hægsti myndugleiki í felagnum.

Í viðtøkum felagsins verða innanhýsis partafelagsviðurskifti skipað.

**7.4 Val av nevnd**

Partafelagslógin ásetir, at nevndarlimir verða valdir á aðalfundinum.

Havast skal í huga, at partafelagslógin gevur starvsfólkunum í felagnum rætt til at velja limir í nevndina. Fyri TFL hevur starvsfólkið rætt til at velja minst 2 nevndarlimir. Talið av nevndarlimum valdir av starvsfólkunum kann ikki vera meira enn 50% av allari nevndini. Hinar limirnar velur aðalfundurin/avvarðandi landsstýrismaður, um ikki annað er fest í viðtøkurnar.

Nevndin eigur at verða sett saman á tann hátt, at felagnum verða tryggjað best møguligur handilsligur serkunnleiki og mótspæl til dagligu leiðsluna. Harafturat skal avvarðandi landsstýrismaður hava møguleika fyri at fylgja gongdini í felagnum.

Felagið eigur sostatt at hava minst 5 nevndarlimir. 2 limir verða valdir av starvsfólkunum, ein limur umboðar avvarðandi landsstýrismann, og 2 limir verða valdir úr vinnulívinum.

Í sambandi við stovnanina av partafelagnum eigur støða at takast til, í hvønn mun tann nevndarlimur, ið umboðar landsstýrismannin hevur rætt til at lata landsstýrismanninum upplýsingar um felagið. Á sama hátt eigur støða at takast til, í hvøn mun landsstýrismaðurin hevur rætt til at vegleiða nevndarlimin.

**8. REGULERING/EFTIRLIT**

At fara frá einum almennum stovni til eitt alment partafelag hevur m.a. við sær eitt skifti frá dagligari politiskari stýring til rammustýring.

Ábyrgdin hjá politikarunum verður at seta rammurnar fyri, hvussu TFL í høvuðsheitum skal rekast, meðan tann dagliga leiðslan verður latin nevnd og stjórn.

Tann nýggja fjarskiftislógin er ein sokallað rammulóg, har staðfest verður, at heimastýrið hevur einkarætt til alt økið og kann lata øðrum rættin at reka fjarskiftið.

Skipanin verður soleiðis, at landsstýrismaðurin kann lata einum ella fleiri fyritøkum konsessión til at reka fjarskifti. Eisini kann landsstýrismaðurin taka avgerð um at gera partar av fjarskiftisøkinum heilt ella lutvíst frælsar. Tað merkir, at einki serstakt loyvi skal til frá tí almenna at reka fjarskifti á teimum frælsu økjunum. Fyri TFL merkir hetta, at tað skal hava konsessión til tey øki, sum ikki verða fræls.

Í eini konsessión verða treytir settar um til dømis veitingarskyldu, tíðarskeið fyri konsessión, gjald fyri konsessión og viðskiftatreytir.

Eitt fjarskiftiseftirlit verður sett á stovn, sum skal hava eftirlit við, at krøvini, sum sett eru í fjarskiftislógini ella við heimild í henni, verða hildin.

## 9. ONNUR VIÐURSKIFTI

### 9. 1 Bókhalds- og roknskaparviðurskifti

TFL hevur egið edv-kervi, bókhald og egnar skrásetingarskipanir.

Ársroknskapirnir hjá TFL eru tey seinastu árini gjørdir sambært ásetingunum í ársroknskaparlógini, eins og galdandi er fyri partafeløg.

Í sambandi við umskipan til partafelag er sostatt ikki neyðugt at broyta bókhalds- og skrásetingarskipanir.

### 9.2 Skatta- og mvg viðurskifti

Í núverandi støðu er TFL ikki skattskyldugt.

Í sambandi við umskipan til partafelag verður skattalógin galdandi fyri TFL, og verður tí skattað av yvirskotinum. Verður vinningsbýti útgoldið, skal TFL afturhalda 35% í avgjaldi, sum skal avroknast til Toll- og Skattstovu Føroya.

Í núverandi støðu er TFL umfatað av vanligum reglum um mvg-avgjald. Henda støða verður óbroytt í sambandi við umskipan til partafelag.

Omanfyri nevnda er treytað av, at serlig undantøk verða ikki gjørd í lógini.

### 9.3 Ávirkan á landskassan

Tá TFL er umskipað til partafelag, fær landskassin inntøkur frá konsessiónsgjaldi, partafelagsskatti og møguligum vinningsbýti.

## ÍSKOYTI 1: BYGNAÐARMØGULEIKAR

Høvuðsendamálini við at umskipa TFL til eitt alment partafelag eru at gera skilnað millum politisku ábyrgdina og dagligu leiðsluábyrgdina og at økja smidleikan og avgerðarfrælsið fyri at betra møguleikarnar at tillaga seg komandi liberaliseringum á fjarskiftisøkinum.

Ein hóskandi spurningur er, um hesi endamál ikki kunnu røkkast við verandi bygnaði, soleiðis at tað ikki er neyðugt at taka stig til at umskipa TFL til eitt alment partafelag.

Umframt at greiða stutt frá eyðkennum fyri almennar stovnar hava vit í stuttum greitt frá øðrum útvaldum bygnaðarmøguleikum.

### A. Almennur stovnur

Uppgávugrundarlagið í einum almennum stovni er givið í viðmerkingunum til ta árligu fíggjarlógina.

Ein almennur stovnur, sum fær játtan á fíggjarlógini, skal hava loyvi úr løgtinginum m.a. til at taka lán. Harafturat verður fíggjarliga gongdin í eini landsfyritøku vanliga mett út frá einum kostnaðarsjónarmiði.

Á einum almennum stovni eru tað landsins avtalur og sáttmálar, sum eru galdandi viðvíkjandi lønar- og setanarviðurskiftum.

Á einum almennum stovni er tað avvarðandi landsstýrismaður, sum hevur endaligu ábyrgdina.

### B. "Nýmótans" almennur stovnur

Ein tillaging av bygnaðinum er at geva landsfyritøkuni størri avgerðarfrælsi. Hetta kann til dømis vera øktir møguleikar at taka lán, betri møguleikar at stovna dótturfeløg og keypa partabrøv í privatum feløgum og møguleika fyri størri smidleika viðvíkjandi lønarviðurskiftum.

Ein slík skipan gevur størri frælsi á summum økjum men skapar ikki tann skilnað millum politiska og dagliga leiðsluábyrgd, sum má metast at vera sera týdningarmikil.

### C. Almennur stovnur við egnari nevnd

Í Danmark finnast dømi um landsfyritøkur við egnari nevnd, men hesar nevndir hava oftast einans ein ráðgevandi leiklut - hetta eru vanliga granskingar- og mentanarfyritøkur.

Mælt verður vanliga frá eini slíkari skipan í eini fyritøku, sum verður rikin eftir handilsligum fortreytum, tí ábyrgdarviðurskiftini eru ov ógreið. Tað er av týdningi, at nevndin fær veruliga ábyrgd, tí annars er vandi fyri, at nevndin verður ein áhugafelagsskapur hjá viðkomandi fyritøku.

**D. Sjálvsognarstovnur**

Tað, sum eyðkennir sjálvsognarstovnar, er, at eingin eigur teir. Hesir stovnar hava vanliga størri frælsi enn vanligir almennir stovnar viðvíkjandi leiðslu- og fíggjarætlanarviðurskiftum.

Hesin bygnaður er hóskandi, tá talan er um útbúgvingar- og mentanarstovnar. Sum dømi úr Danmark kunnu nevnast vinnuskúlar og Danmarks Radio. Henda skipan er tó ikki hóskandi, tá talan er um handilslig viðurskifti.

**E. Vinnurekandi grunnur**

Tað, sum eyðkennir vinnurekandi grunnar, eins og sjálvsognarstovnar, er, at ognarleikluturin er skerdur. Tað vil siga, at rakstrarliga eftirlitið við nevndini er avmarkað.

**F. Almennur stovnur uttan fyri fíggjarætlanina**

Almennir stovnar uttanfyri fíggjarætlanina verða nýttir í Noregi og hava verið nýttir í Finnlandi og Svøríki.

Endamálið við eini slíkari skipan er at geva dagligu leiðsluni sama frælsi sum í einum privatum felag.

Í Noregi er ein slík landsfyritøka eitt sjálvstøðugt rættarsubjekt, sum hevur frían avgerðarrætt viðvíkjandi inntøkum og útreiðslum umframt lántøku. Tó kann hægstamark setast á lántøkurnar. Staturin veðheldur fyri skuldini. Um fyritøkan fær rakstrarligar fíggjarligar trupuleikar, bindur staturin seg til at veita neyðuga hjálp.

Ábyrgdarviðurskiftini í eini slíkari fyritøku eru ógreið. Harumframt kunnu trygdarveitingar frá statinum hava við sær, at leiðsla og nevnd ikki reka fyritøkuna á rakstrarliga bestan hátt. Haraftrurat er bygnaðurin kappingaravlagandi, tí kappingarneytarnir hava ikki somu treytir.

**G. Samandráttur**

Tann skilnaður millum politiska ábyrgd og dagliga leiðsluábyrgd, sum vit meta er sera týdningarmikil, fæst ikki í nøkrum av omanfyri nevndu møguleikum. Nakrir av nevndu møguleikum kunnu tó geva møguleika fyri øktum avgerðarfrælsi.
Økt avgerðarfrælsi eigur at hanga saman við størri ábyrgd. Hetta fæst við einum partafelag, tí her eru avgerðarførleiki og ábyrgdarviðurskifti greið.

## ÍSKOYTI 2: ROKNSKAPARTØL

Fyri at lýsa gongdina í rakstri, fíggjarstøðu, peningastreymi v.m. eru í talvuni niðanfyri settar upp upplýsingar frá roknskapunum fyri árini 1994 til 1996. Harafturat eru sett upp tøl sambært rakstrarætlanini fyri 1997 (1997Æ).

| Tkr. | 1994 | 1995 | 1996 | 1997Æ |
|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | |
| Nettoinntøkur | 128.000 | 131.000 | 147.000 | 165.000 |
| Framleiðsluvirði | 148.538 | 151.494 | 160.502 | 181.525 |
| Rakstrarkostnaður | (82.875) | (84.545) | (93.397) | (107.215) |
| Avskrivningar upp á støðisogn | (34.590) | (32.118) | (37.796) | (43.420) |
| Fíggjarkostnaðir, netto | (15.603) | (13.424) | (11.371) | (8.944) |
| Úrslit | 10.439 | 21.407 | 17.938 | 21.945 |
| **Fíggjarstøða** | | | | |
| Støðisogn | 211.254 | 197.794 | 171.483 | 179.947 |
| Ogn í umferð | 50.540 | 51.588 | 66.095 | 36.541 |
| Ogn í alt | 261.794 | 249.382 | 237.578 | 216.488 |
| | | | | |
| Eginogn | 31.415 | 52.822 | 70.760 | 95.505 |
| Lániskuld | 184.926 | 156.294 | 128.988 | 95.929 |
| Onnur skuld | 45.453 | 40.266 | 37.830 | 25.054 |
| Eginogn og skuld í alt | 261.794 | 249.382 | 237.578 | 216.488 |
| **Peningastreymur** | | | | |
| Frá rakstri | 44.904 | 55.781 | 56.631 | 61.710 |
| Frá íløgum | (16.193) | (18.658) | (11.485) | (32.860) |
| Frá fígging | (37.932) | (33.651) | (28.719) | (41.928) |
| Peningastreymur í alt | (9.221) | 3.472 | 16.427 | (13.079) |
| **Lyklatøl** | | | | |
| Rakstraravkast (%) | 24,3 | 26,5 | 19,9 | 21,1 |
| Ognaravkast (%) | 11,9 | 13,9 | 12,3 | 14,3 |
| Gjaldførisevni (%) | 70,0 | 78,0 | 83,0 | 65,0 |
| Trygdarevni (%) | 12,0 | 21,0 | 30,0 | 44,0 |
| | | | | |
| Tal av fastnettelefonfelagum | 22.637 | 22.246 | 22.856 | 23.372 |
| Tal av fartelefonfelagum | 2.156 | 2.557 | 3.264 | 4.500 |
| Starvsfólk | 195 | 177 | 182 | 190 |

VINNUMÁLASTÝRIÐ SAMSKIFTISDEILDIN

Tórshavn, tann 18-11-97
J.Nr.: 1920-6/97
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: HN/pm

Tygara skriv

Føroya Løgting.

**Løgtingsmál nr. 32/1997: Uppskot til løgtingslóg um umlegging av Telefonverki Føroya Løgtings til partafelag.**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um umlegging av Telefonverki Føroya Løgtings til partafelag**

**Endamál lógarinnar**

**§ 1.** Endamál lógarinnar er at umskipa almenna stovnin Telefonverk Føroya Løgtings til eitt partafelag.

**Yvirtøka av ogn og skuld v.m**

**§ 2.** Landsstýrismanninum er heimilað at stovna partafelag, P/F Telefonverkið, við gildi frá 1. januar 1998 og at leggja felagnum til alla ogn og skuld, rættindi og skuldbindingar hjá Telefonverki Føroya Løgtings.
*Stk. 2.* Við stovnan felagsins heldur virksemi Telefonverk Føroya Løgtings uppat.

**Stovnan av felagi v.m**

**§ 3.** Felagið verður stovnað við tí endamáli at hava í hondum og reka fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.
*Stk. 2.* Partapeningurin verður við stovnan felagsins 75% av eginognini sambært grannskoðaðari byrjunarfíggjarstøðu og metingarfrágreiðing pr. 1. januar 1998, rundað til nærmastu 5 milliónir.
*Stk. 3.* Partapeningurin verður ogn landsins, og kunnu partabrøvini ikki avhendast, uttan løgtingið gevur samtykki til tess.

**Skrásetingar- og tinglýsingargjøld**

**§ 4.** Landsstýrið hevur skyldu til at undantaka partafelagið frá skrásetingargjaldi til Skráseting Føroya í sambandi við stovnan felagsins.
*Stk. 2.* Partafelagið er undantikið skylduni at rinda tinglýsingargjald fyri tinglýsing av ognarheimildum fyri fastar ognir, sum felagið yvirtekur við stovnanina.

**Skattligar avleiðingar**

**§ 5.** Byrjunarfíggjarstøða og metingarfrágreiðing, smb. § 3, stk. 2, verða óbroyttar at leggja til grund í skattleggingini av partafelagnum.

**Gildiskoma v.m.**

**§ 6.** Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og tann 1. januar 1998 fara úr gildi kunngerð nr. 10 frá 18.02.1987, reglugerð fyri Telefonverk Føroya Løgtings, løgtingslóg nr. 28 frá 22.05.1969 um áseting

TINGANES • POSTSMOGA 64 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 1 89 98 • TELEFAX 1 89 78 • E-MAIL: FL@TINGANES.OLIVANT.FO

av telefongjøldum umframt tær kunngerðir. givnar við heimild í nevndu lóg, lóg nr. 110 af 30.05.1927 "om styrelsen af Post- og Telegrafvæsenet", sum broytt við løgtingslóg nr. 17 frá 31.03.1976 og "anordning nr. 156 af 07.04.1924 om telegrambesørgelse gennem telefon".

## Almennar viðmerkingar

**A. Galdanda lóggáva v.m.**
Tann 1. juli 1997 kom í gildi nýggj fjarskiftislóg, løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, sum m.a. hevði til endamáls at skapa fortreytir fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum.

Arbeiðsbólkur við umboðum frá Føroya Landsstýri, telefonverkinum og yrkisfeløgunum varð settur at gera frágreiðing til Føroya Landsstýri um, hvussu telefonverkið átti at verið skipað í framtíðini.

Úrslitið av hesum var *Frágreiðing um umskipan av TFL til partafelag*, sum var latin úr hondum 26. juni 1997, og sum er løgd við sum Skjal 1.

Tilráðing teirra var henda:
Arbeiðsbólkurin heitir tí á Føroya Landsstýri um at skipa so fyri, at TFL skjótast til ber verður umskipað til eitt alment partafelag

Høvuðsendamálið við umleggingini til eitt partafelag er, at greiður skilnaður verður millum politisku ábyrgdina og dagligu leiðsluábyrgdina. Mett verður eisini, at rakstur í partafelagi fer at økja smidleikan og avgerðarfrælsið soleiðis, at betri møguleikar verða fyri tillaging til økta kapping og skiftandi umstøður.

Aðrir møguleikar enn stovnan av partafelagi hava verið umhugsaðir, eitt nú sjálvsognarstovnur, vinnurekandi grunnur og almennur stovnur uttan fyri fíggjarætlanina. Víst verður til frágreiðingina, Skjal 1, síðu 14-15.

**B. Stuttur samandráttur**
Høvuðsinnihaldið í lógini er, at Telefonverk Føroya Løgtings verður umskipað frá einum almennum stovni til eitt partafelag, sum landið eigur allan partapeningin í. Hetta verður gjørt á tann hátt, at partafelagið yvirtekur alla ogn og skuld hjá TFL. Partafelagið verður stovnað við sonevndum apportinnskoti. Um slíka stovnan av partafelagi eru greiðar reglur í partafelagslógini, sum serliga tryggja ognarum og øðrum uttanfyristandandi, at teir kunnu líta á fíggjarligu upplýsingarnar í stovningartilfarinum. Tí er krav um, at byrjunarfíggjarstøða sýnir veruligu virðini, og at gjørd verður ein metingarfrágreiðing.

Stovningardagurin er 1. januar 1998 og fellur sostatt saman við endanum av roknskaparárinum hjá Telefonverkinum.

Fíggjarstøðan í roknskapinum. saman við byrjunarfíggjarstøðuni og metingarfrágreiðingini. verða sostatt grundarlagið undir. hvussu stór eginogn felagsins er við stovnan.

Skotið verður upp, at 75% av eginognini verður partapeningur. meðan restin verður frí eginogn. Sum roknskapartilfarið vísir, svarar hetta til ein partapening uppá uml. kr. 75 mió..

Lógaruppskotið fevnir bert um tríggjar ásetingar, sum partafelagslógin annars fyriskipar, nevniliga
* navn,
* endamálsorðing og
* partapening.

Restina tekur aðalfundurin avgerð um, herundir samtykt av viðtøkum og broytingar av teimum. Tá lógin hevur ásett navn, endamál og reglur um, at partapeningurin ikki kann seljast, skulu viðtøkurnar gerast í neyvum samsvari við hetta, og kann aðalfundurin ikki broyta ásetingarnar í viðtøkunum um hesi viðurskifti.

Sum tað sæst, er í uppskotinum eingin áseting um leiðsluna av nýggja felagnum - nevnd og stjórn. Hetta eru viðurskifti, sum sambært partafelagslógini skulu skipast í viðtøkunum, og tað er aðalfundurin, sum avger innihaldið í viðtøkunum. Tað verður hildið óneyðugt í lógini at áseta reglur um tal og val av nevndarlimum. Her skal viðmerkjast, at sambært partafelagslógini hevur starvsfólkið í nýggja felagnum rætt til at velja nevndarlimir.

**C. Fíggjarligar avleiðingar**

Lógaruppskotið hevur ikki eyka fyrisitingarligan kostnað við sær.

***Inntøkur:***

Inntøkur landskassans eftir umskipanina av TFL til alment partafelag fara at stava frá
◊ loyvisgjaldi,
◊ partafelagsskatti og
◊ vinningsbýti.

*Loyvisgjald:*

Sambært lógini um fjarskifti kann landið áleggja loyvishavarum at gjalda loyvisgjald, sum er árligt gjald fyri rættin til at reka fjarskifti. Loyvisgjaldið verður sambært uppskoti til fíggjarløgtingslóg fyri 1998, smb. 4.38.3.05 komandi 2 árini kr. 2 mió. árliga.

*Partafelagsskattur:*

Umskipanin av TFL hevur við sær, at felagið kemur undir vanligan partafelagsskatt, sum í dag er 27% af skattskyldugu inntøkuni.

Ilt er at meta um, hvussu stórar skattainntøkurnar verða hvørt árið, tí tær eru beinleiðis tengdur at rakstrarligu gongdini, íløgum og skattligum avskrivingum.

*Vinningsbýti:*

Av tí at allur partapeningurin sambært uppskotinum er ogn landskassans, fellur møguligt vinningsbýti til landskassan. Ársaðalfundurin ger av støddina á vinningsbýtinum.

***Útreiðslur:***

Sum er, ábyrgist landskassin fyri øllum skyldum telefonverksins, meðan tað verður partafelagið sjálvt, sum ábyrgist fyri sína skuld eftir umleggingina. Hetta hevur sum meginreglu við sær, at landskassin ikki hevur nakrar útreiðslur av at Telefonverk Føroya Løgtings verður umskipað til partafelag. Tó er, sum aðrastaðni tilskilað, talan um, at landskassin frammanundan hevur borgað fyri lánum telefonverksins mótvegis Nordisk Investeringsbank. Slík borgan kann hava við sær, at landskassin kann verða kravdur sum borgsmaður, um tað verður neyðugt við framhaldandi borgan eftir umleggingina. Sum víst á undir serligu viðmerkingunum, verður roknað við at sleppa landskassanum undan framhaldandi borgan.

Eftir meting leiðslunnar í TFL av gongdini komandi árini, skuldi eingin vandi verið fyri, at borgsskyldan verður effektiv.

**D. Ummæli.**
Sum tað sæst av hjálagda Skjali 1 (Frágreiðing frá 26. juni 1997), hava umboð fyri bæði leiðslu, starvsfólk og avvarðandi yrkisfeløg verið við í fyrireikingararbeiðinum til lógaruppskotið og hava einmælt latið tilráðing um, at TFL verður umskipað til partafelag.

## Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

**Til § 1.**
Greinin sigur, at endamálið við lógini er at leggja Telefonverk Føroya Løgtings um til partafelag.

**Til § 2, stk. 1.**
Sum nevnt í almennu viðmerkingunum kann aðalfundurin ikki broyta navnið á partafelagnum, tí navnið er ásett í lógini. Hinvegin er einki til hindurs fyri, at aðalfundurin samtykkir, at felagið fær sær ymisk undirnøvn, sum kunnu verða hent, serliga tá ræður um samskifti við útlond. Somuleiðis er felagnum loyvt at stovna dótturfeløg, treytað av at endamál teirra er innan lógarinnar karm.

Høvuðsinnihaldið er, at øll ogn og skuld TFL's verður flutt til partafelagið.

*Tá tað ræður um ognir og rættindi*, kunnu hesi flytast til partafelagið, uttan at skuldararnir hava givið teirra samtykki. Hetta er ein meginregla í avtalurættinum, og tí standast eingir trupulleikar av hesum.

Sum lýst á síðu 9 í skjali 3 (Roknskapur fyri tíðarskeiðið 1. januar til 30. juni 1997), er talan um ogn uppá kr. 234 mió., sum í høvuðsheitum greinast soleiðis:
*Støðisogn:*
Støðisognin er kr. 180 mió., harav bygningar og grundøki standa fyri kr. 63 mió. og kaðalar, støðir og radio standa fyri kr. 91 mió.
*Ogn í umferð:*
Ogn í umferð er kr. 54 mió. harav tøkur peningur er kr. 19 mió., áogn er slakar kr. 19 mió. og vørugoymsla kr. 16 mió.
*Tá tað ræður um skuld og skuldbindingar*, er beint øvugt. Her er meginreglan, at skuld ikki við frígerandi virkningi kann flytast frá TFL til partafelagið. Fyri at flyta skuld krevst loyvi frá honum, ið kravið hevur. Kravánararnir kunnu - uttan nakra grundgeving - nokta, at annar

skuldari kemur í staðin. Verður skuldin flutt uttan loyvi frá kravánara. er meginreglan. at TFL og partafelagið hefta solidariskt fyri skuldini.

Ikki er óhugsandi, at onkur kravánari fyri at bøta um eina vánaliga avtalu, sýtir skuldarskiftinum fyri at samráða seg til betri sømdir. Hendir tað, verða slíkir kravánarar innfríaðir.

Skuldin, talan er um, er øll skuld hjá TFL, sum sær soleiðis út:
Við støði í ársroknskapinum pr. 31.12.1996(*Skjal 2*), hálvársroknskapinum pr. 30.06.1997(*Skjal 3*) og meting TFL's um hvussu støðan er pr. 31.12.1997(*Skjal 4*), kann skuldin sundurgreinast soleiðis:

| *Slag av skuld* | *Skuld pr.* 31.12.96 | *Skuld pr.* 30.06.97 | *Mett pr.* 31.12.97 |
|---|---|---|---|
| Langfreistað | 87,7 | 75,0 | 66,7 |
| | | | |
| Stuttfreistað | | | |
| Avdráttir | 41,3 | 38,6 | 26,9 |
| Peningastovnar | 2,4 | 0,5 | 0,0 |
| Forútgjald | 4,5 | 5,2 | 5,2 |
| Vøra- /tænasta | 11,7 | 16,4 | 16,4 |
| Onnur skuld | 19,3 | 14,4 | 14,4 |
| | 79,2 | 75,1 | 62,9 |
| | | | |
| *Skuld íalt* | *166,9* | *150,1* | *129,6* |

***Langfreistaða skuldin:***
Langfreistaða skuldin er lán frá
- ◊ Nordisk Investeringsbank (NIB)
- ◊ Skandinaviska Enskildabanken (SEB)
- ◊ 60-milliόna grunninum og
- ◊ Føroya Banka.

Landskassin borgar sum sjálvskuldari mótvegis NIB og SEB. Borgan landskassans mótvegis NIB er fyri trý lán hjá TFL, hvørs samlaða restskuld pr. 30.06.1997 var umleið kr. 61,4 mió. Av avdráttartíðini eru uml. 6 ár eftir.

Borgan landskassans mótvegis SEB er fyri eitt lán, hvørs restskuld pr. 30.06.1997 var kr. 17,2 mió.

Landsstýrið hevur ta áskoðan, at umleggingin til partafelag, í so stóran mun sum til ber, skal loysa landskassan frá ábyrgd síni móti felagnum. Tí er eitt av málunum at sleppa landskassanum undan verandi borgsskyldum í sambandi við umleggingina.

TFL hevur søkt NIB um loyvi til
*at* P/F Telefonverkið yvirtekur lánini hjá TFL og
*at* NÍB góðtekur at loysa landskassan frá sjálvskuldaraborganini.
NIB hevur prinsippgóðkent umsóknina og góðtekur aðra trygd í staðin. t.e. 1. veðrættur í føstu ognunum.

Í prinsipptilsøgnini eru onkrar treytir, sum TFL ikki vil ganga undir, og tí mugu nærri samráðingar til, áðrenn tilsøgnin er endalig.

Verður tað, at partarnir ikki koma til sættis, og NIB tvíheldur um framhaldandi borgan frá landskassanum, verður neyðugt at venda sær til Føroya Løgting um, at heimila Føroya Landsstýri at borga mótvegis NIB fyri hesum lánum, sum verða yvirtikin av partafelagnum.

*Lánið hjá SEB* fellur til gjaldingar í síni heild komandi apríl mánað. TFL hevur tikið avgerð um at innfría lánið hjá SEB, tí neyðuga gjaldføri loyvir hesum. Landskassin sleppur soleiðis undan framhaldandi at veðhalda mótvegis SEB.
*Lánini hjá 60-millióna grunninum* eru pr. 30.06.1997 til kr. 29,5 mió. Hesi skuld ábyrgist landskassin tó ikki fyri á annan hátt, enn hann ábyrgist fyri ein hvønn annan almennan stovn.
*Lánið hjá Føroya Banka* er nýtt 7 ára lán, sum TFL hevur stovnað í september 1997, stórt kr. 6,1 mió. Sum trygd fyri láninum er tinglýst skaðaloysisbræv, stórt kr. 7,32 mió.

***Stuttfreistaða skuldin:***

*Avdráttir:*
Av tí stuttfreistaðu skuldini er stórur partur "Avdráttur", sum sambært roknskapinum er "Avdráttir av langfreistaðari skuld, sum falla til gjaldingar komandi ár".

*Peningastovnar:*
Her er talan um føroyskar peningastovnar. Ætlanin er, at eingin skuld skal vera við árslok.

*Forútgjald:*
Hetta kemur fram sum forútgjald hjá viðskiftafólki fyri telefon v.m. TFL krevur forútgjald, og tí er hetta altíð ein postur, upptikin í stuttfreistaðu skuldina. Henda skuld elvir ikki til nakrar trupulleikar við umleggingina.

*Vøra/tænasta:*
Her er talan um vøru- og tænastuskuld. Av hesi skuld er størsti parturin leypandi millumverandi hjá TFL við tveir høvuðssamstarvsfelagar, nevniliga Tele Danmark og L.M.Ericsson.

Skuldin til Tele Danmark stavar frá javning av gjaldi partanna millum í uttanlandssamskiftinum. Skuldin til L.M.Ericsson, sum er høvuðsleverandørur av fjarskiftisútgerðini hjá TFL, stavar frá leypandi samarbeiði partanna millum.

TFL hevur frá báðum leverandørum fingið boð um, at hesir ikki meta tað vera nakran trupulleika hjá nýggja partafelagnum at yvirtaka ta skuld, sum verður pr. 31. 12. 1997.

*Onnur skuld:*
Av hesi skuld er stívliga helvtin leypandi skuld til Toll- og Skattstovuna fyri MVG, sum verður goldið kvartárliga afturút. TFL arbeiðir við góðkenning teirra av yvirtøkuni og metir ikki, at hetta kemur at elva til nakrar trupulleikar. Restin av skuldini er vanlig leypandi vøruskuld, sum ikki verður mett at geva nakrar trupulleikar.

**Til § 3, stk. 1.**
Greinin ásetir endamálið hjá nýggja felagnum. Hetta merkir, at aðalfundurin ikki kann broyta endamálsorðingina í viðtøkunum soleiðis, at felagið fer í holt við aðra vinnu enn hana, 1. stk.

ásetir. Um so er, at partafelagið ynskir at fara í aðra vinnu enn fjarskiftisvinnu, krevst lógarbroyting.

**Til § 3, stk. 2.**
Av samlaðu eginognum felagsins skal ein partur vera partapeningur og ein partur fríar ognir.

At partapeningurin verður skotin upp til 75% av eginognini, er tí, at mett verður, at eitt tílíkt lutfall millum eginogn og partapening er hóskandi fyri eina tílíka fyritøku.

Við støði í hálvársroknskapinum 1997, skjal 3, síða 10, var eginognin 30. juni 1997 kr. 84,1 mió. Við støði í metta hálvársroknskapinum, skjal 4, har roknað verður við einum úrsliti uppá kr. 16,8 mió., svarar 75% rundað til nærmastu kr. 5 mió., til kr. 75 mió.

At felagið verður stovnað við hesum partapeningi, er tó ikki til hindurs fyri, at partapeningurin sum frá líður verður tillagaður skiftandi tørvi og umstøðum.

**Til § 3, stk. 3.**
Her verður ásett, at allur partapeningurin í nýggja felagnum verður ogn landsins, og er hetta at skilja sum tann til hvørja tíð verandi partapeningur, eisini eftir møguligar hækkingar.

Við hesi grein verður tryggjað, at privatisering av partafelagnum ikki kann fremjast uttan løgtingsins samtykki.

**Til § 4, stk. 1.**
Skrásetingargjald til Skráseting Føroya er fyri partafeløg í løtuni kr. 2.500 umframt 4‰ av teknaða partapeninginum.

Verður partapeningurin sum ætlað kr. 75 mió., er talan um skrásetingargjald uppá stívar kr. 300.000,-, sum mett verður, ikki eigur at verða goldið, tá talan er um umlegging av almennum stovni til partafelag.

Sambært galdandi partafelagslóg, anordning nr. 250 frá 3. mai 1993, er tað Føroya Landsstýri, sum eftir § 154, stk. 3 hevur heimild til at áseta nærri reglur um gjøld fyri skráseting.

**Til § 4, stk. 2.**
Hóast tað er ein almennur stovnur, ið avhendir fasta ogn, er hesin ikki undantikin tinglýsingargjaldi.

Tinglýsing er føroyskt sermál, og løgtingið hevur tí heimild til, í serlóg sum hesari, at undantaka stovnin frá tinglýsingargjaldinum, sum annars hevði verið 1% av tinglýsingarvirðinum. Verða føstu ognirnar ið tinglýsast skulu, mettar til uml. kr. 70 mió., verður talan um tinglýsingargjald uppá uml. kr. 700.000,-, sum mett verður, ikki eigur at verða goldið, tá talan er um umlegging av almennum stovni til partafelag

**Til § 5.**
Reglan ger endaliga upp virðini á ogn og skuld, tá um skatting ræður.

**Til § 6.**
Lógin fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Í tíðarskeiðinum fram til 1. jan. 1998 er neyðugt, at galdandi lóggáva framhaldandi verður verandi í gildi sum grundarlag undir virksemi telefonverksins.

Tá partafelagið er stovnað 1. januar 1998, fer tann í § 6 nevnda lóggáva úr gildi sama dag.

## Skjøl

***Skjal 1.***
*Frágreiðing um umskipan av Telefonverk Føroya Løgtings til partafelag.*
Henda frágreiðing er givin av arbeiðsbólki, samansettur soleiðis:

1. Andras Róin, telefonverkstjóra, vegna leiðsluna á TFL.
2. Una Joensen, vegna leiðsluna á TFL.
3. Janus Djurhuus, felagsálitismaður, vegna starvfólki á TFL.
4. Jógvan Thomsen, varaálitismaður, vegna starvsfólk á TFL.
5. Jákup Danielsen, formaður í Starvsmannafelagnum.
6. Súni Schwartz Jacobsen, statsautoriseraður grannskoðari, KPMG.

***Skjal 2.***
*Ársroknskapur 1996*
Ársfrágreiðing 1996 hjá Telefonverk Føroya Løgtings við tilhoyrandi grannskoðaðum rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu frá 7. apríl 1997.

***Skjal 3.***
*Hálvársroknskapur 1997/1*
Hálvársroknskapur fyri Telefonverk Føroya Løgtings fyri tíðarskeiðið 1. januar 1997 til 30. juni 1997. Roknskapurin er ikki grannskoðaður, men grannskoðarin hevur hjálpt til við uppseting av honum.

***Skjal 4.***
*Mettur hálvársroknskapur 1997/2*
Meting Telefonverk Føroya Løgtings av rakstraúrslitinum frá 1. juli 1997 til 31. december 1997 tann 17. oktober 1997.

***Skjal 5.***
*Høvuðstøl úr fíggjarætlan Telefonverksins 1997 - 2002*
Telefonverk Føroya Løgtings hevur sett upp "Høvuðstøl úr fíggjarætlan Telefonverksins 1997 til 2002" tann 17. oktober 1997.

**Sámal Petur í Grund**
landsstýrismaður

/ Arni Poulsen

**Fylgiskjøl til lógaruppskot um umskipan av Telefonverk Føroya Løgtings til alment partafelag**

Hjáløgd eru tvey fylgiskjøl:

**Fylgiskjal 4:** ***Mettur hálvársroknskapur 1997/2.***

Meting Telefonverk Føroya Løgtings av rakstrarúrslitinum frá 1. juli 1997 til 31.desember 1997 tann 17. oktober 1997.

**Fylgiskjal 5:** ***Høvuðstøl úr fíggjarætlan Telefonverksins 1997 - 2002.***

Telefonverk Føroya Løgtings hevur sett upp "Høvuðstøl úr fíggjarætlan Telefonverksins 1997 til 2002" tann 17. oktober 1997.

Fjarskiftisøkið hevur framburð hesi árini, og sæst hetta eisini aftur í roknskapum og fíggjarætlanunum hjá Telefonverkinum. Nettosølan øktist frá 1995 til 1996 við 12,3 %, einahelst orsakað av yvirtøkuavtalunum um uttanlandssamskiftið, sum tó eisini høvdu øktar íløgur og rakstrarútreiðslur við sær fyri Telefonverkið.

Telefonverkið væntar framhaldandi vøkstur í nettosøluni og í úrslitinum. Ein høvuðsfortreyt fyri vøkstrinum er, at íløgur verða gjørdar, í at gera digitalisering lidna og útbygging av kervinum, í nýmótansgerð av støðisútbúnaði og av EDV skipanum. Í fíggjarætlanini er lagt upp til, at Telefonverkið ger íløgur fyri 35 mió. kr. um árið fíggjað yvir raksturin, og at lán verða tikin primo 1998 uppá 50 mió. kr. til keyp av kapasiteti í Cantat-3 kaðalinum og 15 mió. kr. til at seta í gongd eina nýggja fartelefonskipan.

Samlaða lániskuldin hjá Telefonverkinum er minkað úr uml. 350 mió. kr. í 1990, niður í 129 mió. kr. primo 1997. Samlaða lániskuldin primo 2002 er, við lántøkunum í 1998, mett at verða 64,4 mió. kr.

Fíggjarætlanin er løgd út frá teimum fortreytum, sum Telefonverkið kennir í dag, men menningin á fjarskiftisøkinum er ógvuslig, og kunnu fortreytirnar broytast skjótt.

**Fylgiskjal 4: Mettur hálvársroknskapur 1997/2**

| | 1.hálvár 97 | 2.hálvár 97 | 1997 |
|---|---|---|---|
| Fastnet | 52,1 | 54,4 | 106,5 |
| Fartelefoni | 8,0 | 11,0 | 19,0 |
| Leiga linjur, vekslarar o.a. | 4,6 | 2,4 | 7,0 |
| Vørusøla | 4,0 | 5,0 | 9,0 |
| Faroe Pack | 0,6 | 0,9 | 1,5 |
| Internet | 0,5 | 1,1 | 1,6 |
| Arbeiði fyri fremmanda rokning | 2,5 | 4,5 | 7,0 |
| Ymiskt | 1,6 | 2,8 | 4,4 |
| **Nettosøla íalt** | **73,9** | **82,1** | **156,0** |
| Broyting, arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning | 0,9 | 0,0 | 0,9 |
| Arbeiði fyri egna rokning upptikið sum støðisogn | 13,7 | 18,0 | 31,7 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | 4,6 | 5,0 | 9,6 |
| **Framleiðsluvirði** | **93,1** | **105,1** | **198,2** |
| Útreiðslur til rávøru og hjálpitilfar | 14,8 | 17,2 | 32,0 |
| Kostnaður av støðisogn | 8,5 | 14,5 | 23,0 |
| Annar rakstrarkostnaður | 5,9 | 6,1 | 12,0 |
| **Bruttoúrslit** | **63,9** | **67,3** | **131,2** |
| Starvsfólkakostnaður | 25,0 | 26,0 | 51,0 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **38,9** | **41,3** | **80,2** |
| Avskrivingar av materiellari støðisogn | 19,4 | 19,6 | 39,0 |
| **Úrslit áðrenn rentur o.a.** | **19,5** | **21,7** | **41,2** |
| Rentuinntøkur og tílíkar inntøkur | 0,4 | 0,6 | 1,0 |
| Rentukostnaður og tílíkar útreiðslur | 5,2 | 4,8 | 10,0 |
| **Úrslit áðrenn konsessiónsgjald** | **14,7** | **17,5** | **32,2** |
| Konsessiónsgjald við meira | 1,3 | 0,7 | 2,0 |
| **Úrslit** | **13,4** | **16,8** | **30,2** |

TELEFONVERK FØROYA LØGTINGS
Tinghúsvegur 3 - Postsmoga 27 - FR-110 Tórshavn
Telefon +298 11433 - Telefax +298 16429



Tórshavn 17. oktober 1997

## Fylgiskjal 5: Høvuðstøl úr fíggjarætlan Telefonverksins 1997 til 2002

| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettosøla | 147.40 | 156.00 | 172.90 | 180.40 | 195.50 | 207.10 | 217.60 |
| Framleiðsluvirði | 160.50 | 198.20 | 215.90 | 221.40 | 234.50 | 246.10 | 256.60 |
| Kostnaður í alt | 45.40 | 67.00 | 75.00 | 81.00 | 87.00 | 93.00 | 99.00 |
| **Bruttovinningur** | **115.10** | **131.20** | **140.90** | **140.40** | **147.50** | **153.10** | **157.60** |
| Starvsfólkakostnaður | 47.90 | 51.00 | 55.00 | 60.00 | 61.00 | 62.00 | 63.00 |
| **Úrslit áðren avskrivingar** | **67.10** | **80.20** | **85.90** | **80.40** | **86.50** | **91.10** | **94.60** |
| Avskrivingar | 37.80 | 39.00 | 39.00 | 39.00 | 39.00 | 39.00 | 39.00 |
| **Úrslit áðrenn rentur o.a.** | **29.30** | **41.20** | **46.90** | **41.40** | **47.50** | **52.10** | **55.60** |
| Rentuinntøkur | 0.60 | 1.00 | 1.00 | 1.00 | 1.00 | 1.00 | 1.00 |
| Rentuútreiðslur | 12.00 | 10.00 | 10.80 | 8.90 | 7.50 | 6.00 | 4.50 |
| **Úrslit áðrenn konsessiónsgjald** | **17.90** | **32.20** | **37.10** | **33.50** | **41.00** | **47.10** | **52.10** |
| konsessiónsgjald | 0.00 | 2.00 | 2.00 | 2.00 | 2.00 | 2.00 | 2.00 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **17.90** | **30.20** | **35.10** | **31.50** | **39.00** | **45.10** | **50.10** |
| skattur av ársúrsliti | 0.00 | 0.00 | 9.48 | 8.51 | 10.53 | 12.18 | 13.53 |
| **Úrslit eftir skatt** | **17.90** | **30.20** | **25.62** | **23.00** | **28.47** | **32.92** | **36.57** |
| | | | | | | | |
| Lániskuld (primo): | | | | | | | |
| langfreista | 130.50 | 87.70 | 124.10 | 104.20 | 84.30 | 64.40 | 46.00 |
| stuttfreista | 25.80 | 41.30 | 34.40 | 19.90 | 19.90 | 19.90 | 18.40 |
| **Íalt** | **156.30** | **129.00** | **158.50** | **124.10** | **104.20** | **84.30** | **64.40** |